TRYGD

# Hálvársfrásøgn

# Interim Report

## H1 2016

### 17. august 2016

**P/F Trygd Tryggingarfelag**

Oknarvegur 5
FO-100 Tórshavn

TRYGD

# Innihaldsyvirlit / Contents

| | |
|---|---|
| **Leiðslufrágreiðing** | 3 |
| - Eginpeningur og gjaldføri felagsins | 4 |
| - Útlit fyri seinna hálvár 2016 | 5 |
| - Aðrar upplýsningar | 5 |
| **Management's Report** | 6 |
| - The company's capital structure and solvency | 7 |
| - Outlook for the remaining of 2016 | 8 |
| - Other information | 8 |
| **Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights** | 9 |
| **Rakstrarúrslit / Income statement** | 10 |
| **Fíggjarstøða / Balance sheet** | 11 |
| **Skuld / Equity and liabilities** | 12 |
| **Leiðsluátekning / Statement by the management** | 13 |

TRYGD

# Leiðslufrágreiðing

Fyrra hálvár 2016 eyðnaðist væl hjá Trygd.

Úrslitið áðrenn skatt gjørdist 11,1 mió. kr., í mun til 0,6 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør – ein betran á góðar 10 mió. kr.

Tryggingartekniska úrslitið var 10,3 mió. kr, í mun til 1,0 mió. kr. fyrra hálvár 2015.

Orsøkirnar til góða úrslitið eru fleiri.

Bruttotryggingargjøldini eru hækkaði við 1,7 mió. kr. samanborið við somu tíð síðsta ár og eru nú 55,3 mió. kr. fyri fyrra hálvár 2016, mun til 53,6 mió. kr. fyrra hálvar 2015.

Men serliga eru tað skaðaendurgjøldini ið hava størst ávirkan á góða úrslitið. Skaðaendurgjøldini eru lækkaði við 8,9 mió. kr., frá 30,7 mió. kr. fyrra hálvar 2015, til 21,7 mió. kr. fyrra hálvár 2016.

Hetta, saman við at úrslitið av íløguvirkseminum er 0,8 mió. kr. ger, at Trygd hevði eitt úrslit áðrenn skatt áljóðandi 11,1 mió. kr. Úrslitið eftir skatt gjørdist 9,1 mió. kr.

Góða gongdin í føroyska samfelagnum hevur jaliga ávirkan á tryggingarinntøkurnar.

Í tráð við, at eitt nú fólkatalið veksur, vaksa ognirnar í føroyska samfelagnum eisini, og sostatt verður meiri at tryggja. Harafturat hevur bilasølan ongantíð verið betri enn tað sama og mongu nýggju bilarnir føra við sær hægri inntøkur av trygginargjaldi.

Harafturat hevur Trygd áhaldandi ment nýggjar tryggingar, ið eisini føra við sær, at inntøkurnar í felagnum hækka.

Skaðagongdin hevur verið munandi betri fyrra hálvár 2016 í mun til fyrra hálvár 2015, og eru endurgjøldini eisini lægri enn væntað. Í mun til sama tíðarskeið í fjør, er Trygd higartil ikki rakt av størri einstøkum skaðum, sum eitt nú eld skaðum á hús. Veðrið hevur eisini hátta sær, so talan hevur heldur ikki verið um ódnir, ið hava gjørt um seg.

Bruttoskaðaprosentið, ið er 47,7 verður hildið at vera gott fyri fyrra hálvár 2016. Skaðaprosentið var 69,7 fyrra hálvár í 2015. Endurgjaldsburturleggingarnar fyri egna rokning vóru kr. 33,8 mió. medio 2016. Hetta kr. 7,4 mió. lægri enn sama tíðarskeið í fjør, tá endurgjaldsburturleggingarnar vóru kr. 41,2 mió.

Rakstrarkostnaðurin í 2016 hevur verið eitt sindur hægri enn í 2015 og fylgir væl rakstrarætlanini. Orsøkin til hægra kostnaðin er serliga hægri kostnaður í sambandi við sølu.

Rakstarkostnaðurin verður hildin at vera á nøktandi støði.

Trygd hevur ikki gjørt stórvegis broytingar í endurtryggingarskránni fyri 2016 í mun til 2015. Í høvuðsheitum snúgva broytingarnar seg um at tillaga endurtryggingina til økta váðan í sambandi við tilgongdini av kundum og tryggingum.

Fíggjarligu inntøkurnar fyrra hálvár í 2016 vóru 0,8 mió. kr. Sama tíðarskeið í 2015 vóru tær -0,3 mió. kr. Hægri kursir á lánsbrævamarknaðunum er høvuðsatvoldin til inntøkuhækkingina. Felagið nýtir varligar íløgumannagongdir og setir tí meginpartin av íløgufænum í lánsbrøv og restina í vanlig avtaluinnlán. Ongar íløgur í partabrøv eru í fyrra hálvárið 2016.

Skatturin av hálvárliga úrslitinum fyri 2016 verður roknaður til 2,0 mió. kr.

Til samans hevur Trygd rentað eginpening sín 12,6 prosent fyrra hálvár í 2016.

Leiðslan er sera væl nøgd við gongdina í felagnum sum heild og fegnast um góða úrslitið fyri fyrra hálvár 2016.

## Eginpeningur og gjaldføri felagsins

Tann 30. juni í 2016 var eginognin 76,8 mió. kr.

Partapeningin, ið er 40 mió. kr., eigur Pf. BankNordik.

Trygd hevur gjøgnum fyrra hálvárið 2016 latið inn uppgerðir um innanhýsis solvens til Tryggingareftirlitið. Uppgerðin um innanhýsis solvens, ið er neyðugur fyri virksemi felagsins, er munandi lægri enn bókaða eginogn felagsins.

Kravið pr. 30.06.2016 var 41,0 mió. kr, meðan bókaða eginognin var 76,8 mió. kr.

Hetta vísir, at solvensurin er lutfalsliga góður.

## Útlit fyri seinna hálvár 2016

Leiðslan væntar, at umsetningurin hækkar nakað seinna hálvár í 2016.

Harða kappingin millum tryggingarfeløgini um prísir og treytir fer óiva at halda fram.

Felagið metir, at nettoúrslitið fyri alt árið 2016 verður um 11-15 mió. kr.

At eginogn felagsins 30. juni í 2016 var 76,8 mió. kr. verður hildið at vera nøktandi fyri virksemið hjá Trygd í 2016.

## Grundarlagið undir hálvársfrágreiðingini

Roknskapurin er gjørdur sambært kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum.

Nýtti roknskaphátturin, ið varð lýstur undir brotinum um roknskaparhættir í ársfrágreiðingini fyri 2015, er óbroyttur.

## Aðrar upplýsingar

Tað eru ikki farnar fram hendingar síðan 30. juni 2016, sum hava avgerandi ávirkan á felagsins rakstur og fíggjarligu støðu.

## Management’s report

The first half year was a satisfactory one for Trygd.

Trygd reported a pre-tax profit of DKK 11,1m in H1 2016. This is an increase of DKK 10.5m compared to 2015 when the profit was DKK 0.6m in the H1 period. The profit after tax was DKK 9.1m in H1 2016, against DKK 0.5m in H1 2015.

The technical result was DKK 10.3m in H1 2016 compared with DKK 1.0m in the same period in 2015.

There are several reasons behind the good result.

Gross premium income increased by DKK 1.7m in H1 2016 and amounted to DKK 55.3m, compared to DKK 53.6m in H1 2015.

But more notably, the biggest influence on the H1 result is the claims expenses. Claims have fallen by DKK 8.9m, from DKK 30.7m in H1 2015, to DKK 21.7m in H1 2016.

This, combined with a profit from financial income of DKK 0.8m, compared to the DKK -0.3m loss in H1 2015, marks the pre tax result of DKK 11.1m in H1.

The healthy financial and demographic developement in the Faroe Islands has a positive influence of the gross premium income.

In line with the positive developments, i.e. increasing population, the total assets in the Faroese societe increases, resulting in more assets needing to be insured. Moreover the ever increasing sales of new cars has never been better, again resulting in an increased demand for insurance.

Trygd has also continuesly developed new products which also benefits sales.

The claims expenses were noticeably lower in H1 2016 compared to H1 2015, and are lower than projected. In contrast to the same period last year, Trygd was not hit by large single losses, such as house fires. Also, the winter did not provide any heavy storms, thus limiting the claims relating to bad weather.

The H1 2016 claims ratio of 47.7 is considered to be satisfactory. The H1 2015 claims ratio was 69.7. Provisions for claims, net of reinsurance, amounted to DKK 33,8m at 30 June 2016. This is DKK 7.4m less than the DKK41,2m in June 2015.

Operating costs have been a bit higher in H1 2016 compared to H1 2015 and follows the operating budget. The increase in expenses is primarily a consequence of increased salesexpenses.

Operating costs are thought to be at an acceptable level.

Trygd has not made any noteworthy changes regarding the reinsurance program for 2016 compared to 2015. The only changes that have been made regard the higher exposure the company has because of the increased number of customers and policies.

Financial income amounted to DKK 0.8m in H1 2016 against a DKK -0.3m loss in H1 2015. Higher bond interest rate levels are the main reason for the increase in financial income.

The company pursues a prudent investment policy, according to which most of the investable funds are placed in bonds and the rest as fixed term deposits. The company held no equity investments in 2016.

Tax on the income for the first half year has been calculated at DKK 2.0m.

Overall, Trygd generated a return on equity of 12.6% in H1 2016.

The management is very satisfied with the development of the company as a whole, and is pleased with the H1 result..

## The company’s capital structure and solvency

Shareholders' equity amounted to DKK 76.8m at 30 June 2016.

The share capital of DKK 40m is wholly owned by P/F BankNordik.

Trygd has through the course of 2016 submitted statements of solvency to the Insurance Authority of the Faroe Islands. The calculated individual solvency required for the company's current operations is substantially lower that the company's shareholders equity.

The requirement on 30 June 2016 was DKK 41.0m while the company's shareholders' equity was DKK 76.8m.

This confirms the company's relatively strong financial position.

## Outlook for the remaining of 2016

Management anticipates a small increase in revenue flows in the second half of 2016.

The fierce competition among existing providers is expected to persist with respect to prices as well as terms and conditions.

Trygd expects the full-year net profit to be around DKK 11-15m.

Equity of DKK 76.8m at 30 June 2016 is considered satisfactory in view of Trygd's operations in 2016.

## Basis of preparation of the H1 financial statements

The interim financial statements have been prepared in accordance with Executive Order No. 2 of 30 December 2009 on financial reports presented by insurance companies.

The accounting policies applied are set out in Annual Report 2015 and are unchanged.

## Other information

No events have occurred since 31 June 2016 which are of material significance to the company's financial or operating position.

## Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights

| **Høvuðstøl / key figures**<br>**DKK 1.000** | **30.06.2016** | **30.06.2015** | **30.06.2014** | **30.06.2013** | **30.06.2012** | **31.12.2015** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tryggingargjøld, brutto / Gross premiums written | 45.688 | 44.169 | 41.936 | 44.569 | 42.538 | 88.981 |
| Bruttoskaðaendurgjøld / Gross insurance claims | -21.781 | -30.787 | -27.792 | -20.900 | -24.919 | -54.137 |
| Rakstrarútreiðslur av trygging / Total insurance operating expenses | -10.428 | -9.642 | -9.116 | -9.147 | -10.498 | -21.084 |
| Úrslit av endurtrygging / Profit/loss on business ceded | -3.098 | -2.665 | -2.673 | -1.455 | 1.741 | -5.705 |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **10.312** | **979** | **2.435** | **13.161** | **9.089** | **7.920** |
| Íløguavkast eftir trygg. tekniska rentu /<br>Investment yield after tech. interest rate income | 807 | -342 | 2.212 | 178 | 1.135 | -14 |
| **Úrslit / Net profit** | **9.118** | **523** | **3.783** | **10.835** | **8.383** | **6.483** |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum / Run-off gains/losses | 5.173 | 1.982 | 377 | -1.462 | -3.852 | 4.332 |
| **Fíggjarstøða / Balance sheet** | | | | | | |
| Tryggingartekniskar avseting tilsamans / Technical provisions total | 72.856 | 77.185 | 77.087 | 72.465 | 79.475 | 70.433 |
| Tryggingaráogn tilsamans / Total Technical assets | 846 | 512 | 1.151 | 2.355 | 10.577 | 615 |
| Eginogn tilsamans / Total Equity | 76.762 | 63.683 | 79.422 | 98.782 | 97.369 | 69.643 |
| Áogn tilsamans / Total Assets | 165.394 | 158.543 | 174.790 | 192.722 | 193.531 | 166.763 |
| **Lyklatøl / Ratios** | | | | | | |
| Bruttoendurgjaldsprosent / Claim ratio | 47,7 | 69,7 | 66,3 | 46,9 | 58,6 | 60,8 |
| Bruttokostnaðarprosent / Gross expense ratio | 22,8 | 21,8 | 21,7 | 20,5 | 24,7 | 23,7 |
| Endurtryggingar %, netto / Net reinsurance ratio | 6,8 | 6,0 | 6,4 | 3,3 | -4,1 | 6,4 |
| Combined Ratio / Combined Ratio | 77,3 | 97,6 | 94,4 | 70,7 | 79,2 | 90,9 |
| Operating Ratio / Operating Ratio | 77,4 | 97,8 | 94,2 | 70,5 | 78,7 | 91,1 |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum /<br>Relative Run-off gains/losses | 12,5 | 5,2 | 0,8 | -3,7 | -6,6 | 11,4 |
| Eginognsavkast í % / Return on Equity, % | 12,6 | 0,8 | 4,9 | 11,6 | 9,0 | 9,8 |
| Solvensdekning / Solvency Coverage | 2,9 | 2,4 | 3,0 | 4,1 | 4,1 | 2,6 |

# Rakstrarúrslit / Income statement

| DKK 1.000 | 30.06.2016 | 30.06.2015 |
|---|---|---|
| Tryggingargjøld, brutto / Gross premiums written | 55.337 | 53.609 |
| Latin endurtryggingargjøld / Ceded insurance premiums | -3.726 | -3.360 |
| Broyting í avsetingum til tryggingargjøld / Change in gross provisions for | -9.650 | -9.440 |
| Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til tryggingargjøld / | 336 | 340 |
| **Tryggingargjøld f.e.r. / Earned premiums, net of reinsurance** | **42.297** | **41.149** |
| | | |
| **Tryggingarteknisk renta f.e.r. / Technical interest, net of reinsurance** | **-68** | **-95** |
| | | |
| Útgoldin skaðagjøld, brutto / Claims paid | -29.008 | -27.510 |
| Endurgoldið frá endurtryggingingini / Reinsurance recoveries | 152 | 88 |
| Broyting í avsetingum til skaðagjøld / Change in gross provisions for | 7.227 | -3.277 |
| Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til skaðagjøld / Change in | -105 | 45 |
| **Skaðagjøld f.e.r. / Claims incurred, net of reinsurance** | **-21.734** | **-30.655** |
| | | |
| Fyrisitingarútreiðslur / Administrative expenses | -3.533 | -3.503 |
| Tekningarútreiðslur / Acquisition costs | -6.895 | -6.140 |
| Provisiónir frá endurtryggingum / Commission from reinsurers | 245 | 223 |
| **Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r / Total insurance operating expenses,** | **-10.183** | **-9.420** |
| | | |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **10.312** | **979** |
| | | |
| Inntøkur av fastari ogn / Income from real property | -31 | -22 |
| Rentur og vinningsbýti v.m. / Interest and dividends, etc. | 523 | 868 |
| Virðisjavnan av íløguognum / Value adjustments of investment assets | 247 | -1.284 |
| **Inntøkur av íløguognum / Income from investment assets** | **739** | **-437** |
| | | |
| **Flutt til tryggingartekniska rentu / Transferred to technical interest** | **68** | **95** |
| | | |
| **Úrslit av íløguvirksemi / Return on investment activities** | **807** | **-342** |
| | | |
| **Úrslit undan skatti / Profit before tax** | **11.120** | **638** |
| | | |
| **Skattir / Tax** | **-2.001** | **-115** |
| | | |
| **Hálvársúrslit / Profit for the year** | **9.118** | **523** |

# Fíggjarstøða / Balance sheet

| DKK 1.000 | 30.06.2016 | 30.06.2015 |
|---|---|---|
| **Ogn / Assets** | | |
| Rakstrargøgn | 409 | 531 |
| Bygningar / Real property | 1.994 | 2.015 |
| **Materiell ogn í alt** | **2.404** | **2.546** |
| | | |
| Lánsbrøv / Bonds | 133.750 | 93.730 |
| **Íløguognir í alt/ Investment assets** | **133.750** | **93.730** |
| | | |
| Endurtryggjaranna partur av avsettum tryggingargjøldum | 336 | 340 |
| Endurtryggjaranna partur av avsetingum til endurgjøld | 510 | 171 |
| **Endurtryggjaranna partur av avsetingum til tryggingaravtalur í alt** | **846** | **512** |
| | | |
| Áogn hjá tryggingartakarum / Receivables from policyholders | 8.340 | 8.537 |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum / Receivables from insurance companies | 29 | 0 |
| Onnur áogn / Other receivables | 0 | 0 |
| **Áogn í alt / Receivables** | 8.369 | 8.537 |
| | | |
| Útsett skattaogn | 37 | 30 |
| Tøkur peningur | 18.234 | 51.788 |
| **Aðrar ognir í alt/ Other assets** | **18.271** | **51.819** |
| | | |
| Rentur tilgóðar | 270 | 368 |
| Aðrar tíðarmarkinger | 1.484 | 1.033 |
| **Tíðaravmarkingar í alt/ Prepayments** | **1.754** | **1.401** |
| | | |
| **Ognir tilsamans / Total assets** | **165.394** | **158.543** |

## Skuld / Equity and liabilities

| | | |
|---|---|---|
| **Partapeningur / Share capital** | **40.000** | **40.000** |
| Framflutt úrslit / Retained earnings | 36.762 | 23.683 |
| Eginpeningur / Equity | 76.762 | 63.683 |
| | | |
| Avsett til tryggingargjøld / Gross provisions for unearned premiums | **38.549** | **35.801** |
| Avsett til endurgjøld / Gross provisions for claims | 34.307 | 41.385 |
| Tryggingartekniskar avsetingar í alt | 72.856 | 77.185 |
| | | |
| **Skuld** | | |
| **Skuld í samband við endurtrygging / Debt related to reinsurance** | **966** | **279** |
| Skattur / Tax | 3.435 | 2.853 |
| Onnur skuld / Other payables | 5.228 | 8.409 |
| Udbytte for regnskabsåret | 0 | 0 |
| Skuld / Total debt | 9.628 | 11.541 |
| | | |
| Tíðaravmarkingar / Accruals and deferred income | **6.149** | **6.134** |
| | | |
| **Skuld tilsamans / Total equity and liabilities** | **165.394** | **158.543** |

## Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrágreiðingina hjá P/F Trygd fyri tíðarskeiðið 1. januar – 30. juni 2016.

Hálvársfrágreiðingin er gjørd bæði sambært kunngerð nr. 2 frá 30. desembur 2009 um fíggjarligar frágreiðingar hjá tryggingarfeløgum og sambært viðtøkum felagsins.

Vit halda, at menningin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftini í P/F Trygd eru rætt eftirkannað í leiðslufrágreiðingini, og at týðandi váðar og óvissutættir, sum kunnu raka felagið, verða lýstir.

Vit halda, at tann nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at roknskaparligu metingarnar eru álítandi.

Vit halda eisini, at øll framløgan av hálvársfrágreiðingini vísir røttu støðuna. Okkara fatan er at hálvársfrágreiðingin gevur eina rættvísandi mynd av ogn, og skuld, og úrslitinum av virksemi og peningarensli í P/F Trygd.

Tað er ikki framd grannskoðan ella review av hálvársfrágreiðingini.

Tórshavn, 17. august 2016

## Statement by the management

The Board of Directors and the Management Board today considered and approved the interim report of P/F Trygd for the six months ended 30 June 2016.

The interim financial statements have been prepared in accordance with Executive Order No. 2 of 30 December 2009 on financial reports presented by insurance companies and with the company's articles of association.

In our opinion, the management's report includes a fair review of the developments and performance of the activities and financial position of P/F Trygd and describes significant risks and elements of uncertainty that it faces.

We consider the accounting policies applied to be appropriate and the accounting estimates to be reasonable.

Furthermore, we find the overall interim report presentation true and fair. In our opinion, the interim report gives a true and fair view of P/F Trygd's assets, liabilities, financial position, results of operations and cash flows.

The interim report has been neither reviewed nor audited.

Tórshavn, 17th August 2016

**Stjórn / Executive Board**

Janus Thomsen

**Nevnd / Board of Directors**

| | | |
|---|---|---|
| Rune Nørregaard<br>Formaður / Chairman | Árni Ellefsen | Jens Erik Christensen |